# g gloyma sín heimamarknað


*Vinnulívsfólk og stigtakarar til átakið í Íslandi eru á veg út úr bussinum. Veðrið er gott, men tað er kalt. Føroyingar eru í Íslandi og hoyra um íslendsku útrásina*

semi í Íslandi, Jákup á Dul Jacobsen og Gunnar Justinussen, greiddu eisini frá, hvussu teir fingu fótin fyri seg í Íslandi.

## Upplyftandi

- Eg haldi, at hetta hevur verið ein ógvuliga áhugaverd og upplyftandi vitjan í Íslandi. Vit hava hoyrt nógv, og eg haldi, at vit hava fingið eitt gott innlit í, hvussu íslendingar hava gjørt, nú tað er ein sannroynd, at teir hava lyft seg upp til at teljast millum fremstu lond um okkara leiðir.

Áki vísir á, at búskaparliga framgongdin í Íslandi hevur verið ógvuliga stór seinastu árini.

EBS-samstarvið hevur eisini havt stóran týdning fyri íslendska vinnu.

- Vit hava fingið eitt gott innlit í, hvussu íslendingar hava gjørt fyri at koma sær út í heimin og í nógv størri mun enn vit hava gjørt seg galdandi í altjóða vinnulívi.

Hann sigur, at á ferðini í Íslandi hava føroysku vinnulívsfólkini hoyrt, hvussu stórt kanningararbeiði liggur aftanfyri tey átøk, sum íslendingar hava gjørt úti í heimi, og hvussu íslendsku bankarnir saman við vinnulívinum hava verið við í hesi tilgongd.

- Íslendingar hava ikki í so stóran mun gjørt íløgur í bygningar uttanlands, men hava meira lagt seg eftir málinum at sleppa inn á marknaðirnar.


*- Eg haldi, at hetta hevur verið ógvuliga áhugavert og upplyftandi fyri føroysk vinnulívsfólk, heldur Áki Johansen*


*Nógv kend andlit. Føroysk vinnulívsfólk úr ymiskum vinnum læra av bróðratjóðini fyri vestan um, hvussu teir hava gjørt*

## Hugburðurin

Leiðarin á útflutningsdeildini hjá Menningarstovuni heldur, at framgongdin, sum íslendski búskapurin hevur havt seinastu árini, er "absoluttur" veruleiki, sum hann tekur til – og ikki hvørvisjónir.

- Sjálvandi vita íslendingar, at stóri vøksturin í búskapinum ikki kann halda fram við somu ferð sum higartil, men eg ivist onga løtu í, at framgongdin, sum verið hevur, fer at koma granntjóðini fyri vestan til góðar í framtíðini.

Áki heldur, at størsti munurin á íslendingum og føroyingum, er hugburðurin.

- Vit hava lyndi til at síggja forðingar í teimum broytingum, sum eru úti í heimi, nú marknaðargarðar verða brotnir. Hinvegin hava íslendingar sæð møguleikar – og hava tikið upp avbjóðingina, sum liggur í hesum møguleikum.

Áki tekur saman um og sigur, at hugburðurin og mentaliteturin í londunum báðum er ólíkur.

- Íslendingar halda ikki, at tekniskar ella fysiskar forðingar eru við broyttu marknaðarstøðuni, sum ikki vinnast kann á. Eg haldi, at størsti trupulleikin hjá okkum er at vinna á hugburðinum, sum liggur í okkum føroyingum. Íslendingar hava dugað at sæð møguleikarnar, meðan vit hava stært okkum blindar í avmarkingunum.

## Hugsa úteftir

Áki heldur, at føroyskar vinnufyritøkur hava góðar møguleikar at gera seg galdandi á íslendska marknaðinum, tí líkt er til, at íslendingar hava lyndi at gloyma sín egna marknað, nú teir hava lagt so stóra orku í at náa út um landoddarnar.

- Hóast bæði londini eru lutfalsliga smá, er íslendski marknaðurin væl størri enn hin føroyski, og tí haldi eg, at føroyskar vinnufyritøkur avgjørt hava ein góðan møguleika at selja sínar vørur og tænastur á íslendska heimamarknaðinum. Haraftrat kemur, at nú búskaparliga framgongdin í Íslandi hevur verið so stór seinastu árini, er keypiorkan í Íslandi eisini nógv økt, sigur leiðarin á útflutningsdeildini.

## Málrættað

- Eg haldi, at tað er áhugavert, at føroyskur ungdómur nú í størri mun enn áður eisini nemur sær útbúgvingar í øðrum londum enn Danmark. Hetta er broytt seinastu árini, og eg ivist onga løtu í, at tað fer at síggjast aftur sum tíðin líður.

Áki vísir á, at íslendingar síggja mun á teimum, sum útbúgva seg í Evropu og teimum, sum útbúgva seg í USA.

- Íslendingar halda nevniliga, at útbúgvingarnar í Evropu í stóran mun byggja á teoriir, meðan útbúgvingarnar í USA tykjast meira málrættaðar, soleiðis at fólk, sum hava nomið sær útbúgvingar í USA, skjótari koma í gongd við praktisk átøk, sigur Áki Johansen.

Á ferðini í Íslandi hevur føroyska ferðalagið búð á Hotel Nordica í Reykjavík.